# Javnaðarflokkurin í Vágum er liðugur við uppstillingina

**Fýra valevni eru á listanum**

UPPSTILLING
*Eirikur Lindenskov*

Umframt eitt valevni úr hvørjari av teimum stóru bygdunum, stillar Javnaðarflokkurin upp eitt valevni fyri SU.

Seinast Javnaðarflokkurin hevði løgtingsmann í Vágum var í valskeiðnum 1990 – 94, tá Frank Davidsen umboðaði flokkin á tingi. Hann fall við valið í 1994 og stillaði ikki upp til valið í 1998. Tá fekk Rasmus Niclasen í Sørvági felstar atkvøður.

Listin hjá Javnaðarflokkinum í Vágum sær soleiðis út:

Kristoffur Gaardlykke, lærlingur, Miðvágur fyri SU,
Malan Helgadóttir, økisskrivari, Miðvágur
Rasmus Niclassen, netumsitari, Sørvágur
Sigfríð Olsen, sjúkrahjálpari, Sandavágur

# Skeið um demenssjúku

SKEIÐ
*Alzheimerfelagið*

Hvussu eru vit saman við teimum dementu?
Minnið, hvat er tað?
Sorg.
Ótti.
Samvitska.

Hesi eru nøkur av evnunum, sum verða viðgjørd á skeiði í MBF-húsinum mánadagin tann 11.mars kl. 9 – 16. Tað er Elsa Zachariasen, sum stendur fyri skeiðinum. Elsa er útbúgvin sjúkrasystir, hon er demensráðgevi og arbeiðir sum deildarleiðari á einari demensdeild í Brøndby. Hon hevur drúgvar royndir sum undirvísari og fyrilestrarhaldari um demens.

Í mesta lagi 20 fólk sleppa við á skeiðið.

Tilmelding á tlf. 313102 ella teldupost: sigmo@post.olivant.fo

# MBF sett dagligan leiðara

**Fríggjadagin 1. mars tók Anna Suffía Durhuus við sum dagligur leiðari á MBF. Hetta er at rokna sum eitt fulltíðarstarv, og fer hennara arbeiði mest at umfata samstarv við limafeløgini hjá MBF umframt teir almennu myndugleikarnar**

STARVSSETAN
*Ingrid Bjarnastein*



*Anna Suffía Durhuus tók 1. mars við starvinum sum dagligur leiðari á MBF*

Heilt fitt av fólki var samankomið fyrrapartin fríggjadagin, tá MBF setti Onnu Suffíu Durhuus í starv, sum dagligur leiðari. Millum gestirnar var eisini landsstýrismaðurin í Almanna- og heilsumálum, Sámal Petur í Grund. Nógvar vóru blómurnar, og hýrurin var góður millum samankomnu gestirnar.

–Mítt arbeiði er fyrst og fremst at útynna tað í verki, sum limafeløgini samtykkja, og at menna eitt gott samstarv millum limafeløgini, sigur Anna Suffía Durhuus, nýggi dagligi leiðarin á MBF.

–Eg vil royna at fasthalda eitt høgt kunningarstøði millum limafeløgini, almenningin og almennu myndugleikarnar.

MBF hevur 22 limafeløg, sum hava gjørt eina virkisskrá, sum er ein 6 ára ætlan. Arbeiðið hjá Onnu Suffíu verður so at gera arbeiði, sum formaðurin býður henni. Tað vil siga fyriskipa, samskipa og leiða arbeiðið sum heild.

Munurin á formanni og leiðarar er tann, at formaðurin er politiskt valdur. Núverandi formaðurin í MBF, Doris Hansen verður í øllum førum formaður til maj mánaða í ár.

–Eg fari at royna at stuðla, ráðgeva og vera uppsøkjandi. Eg gleði meg nógv at sleppa at byrja, og eg eri spent at vita, hvat hetta arbeiðið hevur at bjóða mær. Nógv er at tríva í. Tað er áhugavert, men eisini strævið og hóast alt eisini stuttligt.

Anna Suffía Durhuus er 57 ára gomul. Hon er útbúgvin sjúkrasystir og sjúkrasystralærari. Í 14 ár hevur hon starvast sum deildarsjúkrasystir á psykiatrisku deild, 4 ár hevur hon verið formaður í sjúkrasystrafelagnum og í 14 ár afturat, hevur hon verið lærari á sjúkrasystraskúlanum.

Sangleikurin Godspell:

# Lovandi framførsla



*Sangleikurin Godspell verður frumframførdur mikukvøldið. Tað eru næmingar og fyrrverandi næmingar á Studentaskúlanum í Hoydølum, sum spæla og syngja leikin.*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Sangleikurin hjá Studentaskúlanum í Hoydølum, Godspell, er nú nærum búgvin til sína fyrstu framførslu. Fyrrapartin í gjár var ein lítil smakkiroynd á Studentaskúlanum fyri næmingum og tíðindafólki, og lagt varð upp til eina livandi og spennandi framførslu**

SANGLEIKUR
*Ingrid Bjarnastein*



Godspell er ein av best umtóktu Broadway-leikunum nakrantíð, og leikurin hevur verið spældur kring allan heimin, og nú eisini í Føroyum. Tað eru næmingar og fyrrverandi næmingar á Studentaskúlanum í Hoydølum, sum framføra leikin, sum fyrstu ferð var á palli 17. mai í 1971.

Jesus-leiklutin hevur Líggjas Olsen, sum eisini er kendur úr bólkinum Deja-vu. Ria Tórgarð hevur leikstjórnað leikinum, og Hans Olivur Højgaard Joensen er lærarin, ið stendur aftanfyri meginpartin av arbeiðinum.

–Vit byrjaðu longu við skúlabyrjan at fyrireika leikin, sigur Hans Olivur Højgaard Joensen. – Tey ymsu loyvini og umsóknir skuldu fáast uppá pláss, og tá høvdu vit eisini "audition" til leikin. Fólk kundu tekna seg til audition, men av tí, at ikki var nóg mikið av mannligum sangrøddum hava vit verið noydd til at fáa hjálp uttanifrá frá Líggjas og Espen.

Eini 20 fólk høvdu teknað seg til upptøkuroyndina, og tørvur var á umleið 15 fólkum. Tey vórðu útvald eftir dygd. Tað vil siga, hvussu væl tey duga at syngja og spæla.

**Spældur á skúlanum**

Leikurin verður allur spældur á skúlanum. Tveir pallar verða brúktir til hetta høvið, og sigast kann, at plássið er væl brúkt. Eini 200 sitipláss er, og tað eru bert 100 minni enn tað var til Skeyk, sangleikin, sum Studentaskúlin spældi fyri nøkrum árum síðani uppi í Norðurlandahúsinum. At Godspell verður spældur á Studentaskúlanum hevur eisini við sær, at leikurin er rættiliga bíligur at framleiða, og ikki krevur tí ikki teir heilt stóru fíggjarkarmarnar.

–Vit hava vant hart, greiðir Hans Olivur víðari frá. – Áðrenn jól vandu vit, tað vil siga høvuðsleikararnir, einaferð um vikuna, og nú aftaná jól tvær til tríggjar ferðir um vikuna. Seinastu 14 dagarnar hava vit so verið her hvønn tann einasta dag. Kórið hevur vant eina ferð um vikuna í fýra mánaðar og tað sama við orkestrinum.

Alt er ikki rættiliga klárt enn. Eitt sindur skal málast ymsastaðni afturat, ljósið skal stillast inn og onnur smáting skulu eisini fáast uppá pláss.

Leikurin er hálvan annan tíma til longdar. Eini 15 sangir, og ímillum hvønn sangin er ein sjónleikur, mimikkur ella eitt líknilsi.

–Tað hevur verið eitt stórt arbeiði hjá Riu Tórgarð at fáa alt at hanga saman. Í leikinum eru eini 25 pallskift, so tað er ikki bara sum at siga tað.

**Livandi og intenst**

Av tí at leikurin er runt í nærum øllum hølinum, so verður atmosferan heilt serlig. Leikararnir venda sær beinleiðis til áskoðararnar, og full ferð er á alla tíðina. Hetta kann í øllum førum sigast eftir teimum báðum brotunum, ið vóru víst fyrrapartin í gjár.

At hetta var fyrsta ferðin leikararnir framførdu fyri áskoðarum sást ikki aftur á teimum. Tað riggaði væl, men kundi kanska viðhvørt tykjast eitt sindur fløkjasligt, tá pallarnir, ið nýttir verða, standa í hvør sínum enda av hølinum. Men bæði kór og leikarar dugdu væl, og lagt er upp til eina spennandi framførslu.

Í kvøld er aðalroyndin, og í annaðkvøld, mikukvøldið verður leikurin frumframførdur. Atgongumerki ber til at ogna sær á Kunningarstovuni. Leikurin verður bert sýndur til og við komandi týskvøld, av tí at næmingar skulu á námsferð.




Halgir Winther Poulsen, adv.
Magnus S. Petersen, adv.
Fríða Patursson, adv.
Ólavur Jákup Kristoffersen, adv.
Christian Andreasen, adv.
Niels Winther Poulsen, adv.

## Trøð á Hvítanesi til sølu



Fæst hóskandi boð, selja vit eina trøð á Hvítanesi, sum er góðar 27.000 $m^2$.

Á trøðini er loyvi at útstykkja upp til 7 grundstykkir.

Nærri fæst at vita við at venda sær til skrivstovu okkara.

**ADVOKATSKRIVSTOVAN**
Fr. Petersensgøta 9 • 100 Tórshavn • tlf 311145

## Deildarskrivari Søgu- og samfelagsdeildin

**Fróðskaparsetur Føroya**

Søkt verður eftir deildarskrivara á Søgu- og samfelagsdeildini frá 1. apríl ella skjótast til ber.

**Uppgávur**
Deildarskrivarin er høgra hond hjá megindeildarleiðaranum og ein av meginásunum á deildini. Deildarskrivarin tekur sær av vanliga skrivstovuarbeiðinum, sum er:
- samskifti við studentar, lærarar, seturskrivstovuna og onnur
- fyrireiking og uppfylging av fundum
- prótøku fyrisiting
- brævaskifti og journal
- dagliga fíggjarfyrisiting á deildini í samstarvi við deildarleiðara og seturskrivstovu

**Førleikakrøv**
Skrivaraarbeiðið er sera áhugavert, fjølbroytt og sjálvstøðugt. Krøv verða tí sett til:
- evni at arbeiða sjálvstøðugt
- evni at samskifta og samstarva við onnur
- góðan kunnleika til føroyskt, danskt og helst eisini enskt
- góðan kunnleika til fíggjarviðurskifti
- góðan kunnleika til edv

**Setanarviðurskfiti**
Starvið er 3/4 starv og verður lønt í 3. flokki sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálastýrið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til megindeildarleiðaran, Jóan Paula Joensen, Søgu- og samfelagsdeildin á telefon 317009 og 224371 ella jopajo@setur.fo.

Umsókn við ævilýsing, avriti av prógvum, váttan um arbeiðsroyndir, viðmælum o.l. verður at senda Søgu- og Samfelagsdeildini í seinasta lagi 20. mars 2002.

Fróðskaparsetur Føroya
**Søgu- og samfelagsdeildin**
J. C. Svabos gøta 14,
FO 110 Tórshavn.

Endamálið hjá Søgu- og samfelagsdeildini er hægri undirvísing og gransking. Á deildini starvast 6 lærarar og granskarar. Deildin hevur studentar, ið lesa søgu og stjórnmálafrøði, umframt fleiri lesandi, ið taka støk skeið. Deildin hevur nógv samband úteftir.

**Almanna- og heilsuútbúgvingarnar**
800 Tvøroyri

## Umsóknarbløð

**til heilsuhjálpara**

Umsóknarbløð til heilsuhjálpara (1 ár) eru nú at fáa á skúlanum og á øllum miðnámsskúlum kring landið.

Freistin at søkja er 15. mars 2002.

Fleiri upplýsingar kunnu fáast við at venda sær til skúlan.

Tlf. 372855
t-post: ahd@skulin.fo • www.skulin.fo/ahd

Sosialurin

## Hondlesing í Tórshavn

## í døgunum 1.-4. apríl

Hondlesarin Marita er í Føroyum. Lesir tína hond – fortíð, nútíð og framtíð – styrki og veikleika. Ein annarleiðis máti at síggja teg sjálvan.

Ring og bið um tíð á
**tlf. 0045 39664880** aftaná kl. 16.00

## Sethús í Sørvági til sølu

Húsini standa á Stórheyggi og eru í 2 hæddum.

Samlað búøkið er 120 fermetrar, alt innrættað. Grundøkið er 703 fermetrar.

Í ovaru hæddini eru: 4 kømur, gongd og baðirúm v/ w.c.

Í niðaru hæddini er: stova, køkur, grovkøkur/fýrrúm, gongd og w.c.

Húsini eru úr betong og klødd við timbur og standa serliga væl fyri í friðarligum barnavinarligum umhvørvi, og við sera góðum útsýni yvir bygdina og Sørvágsfjørð.

Byggiár: 1989

Húsini verða seld um hóskandi boð fæst.

Áhuga kunnu ringja

**Tlf. 332834**
*eftir kl. 17.00*

***P/F Frants Restorff***

## Vit sóknast eftir fólki til fast starv til handilin

Arbeiðstíðirnar eru hesar:
kl. 06.00–13.00, kl. 13.00–19.00
kl. 19.00–23.30. Allar dagar í vikuni.

Løn eftir S og K

***Pf. Frants Restorff***
Tórsgøta 13 · Tlf. 311060
Postmoga 41 · 110 Tórshavn

frants restorff